# Til samkomur og kirkjur.

IKTUS, kristiligt kringvarp, varð stovnað í mai 2008, og sjónvarpsrásin IKTUS byrjaði regluligu sendingarnar 30 okt. 2008 á nýggjum talgiltum sendinetið í Føroyum. IKTUS er tvørkirkjulig, tað vil siga, at allar evangeliskar kirkjur og samkomur kunnu luttaka við møtum og sendingum.
IKTUS, sum á griskum merkir fiskur, var eyðkennið hjá teimum fyrstu kristnu, og hevur verið brúkt av kristnum kring allan heimin líka til í dag. Okkara endamál er at bera út evangeliið um Jesus, bæði í Føroyum og uttanlanda, og sum navnið sigur, at vera menniskjafiskimenn, vit ynskja at vera eitt net, sum samkomur og kirkjur í Føroyum kunnu brúka at boða evangeliið.
*Mark. 1.17: Jesus segði við teir: „Fylgið Mær, so skal Eg gera tykkum til menniskjafiskimenn!“*

Endamálið er at senda mest møguligt føroyskt tilfar, innihaldið verður t.d. evangeliskar talur, sangframførðslur, vitnisburðar, andaktir, Bíbliulestur, fyrilestrar, prát við gestir um lív og átrúna (bæði sum interview og kjak), náttúrusendingar, samrøður og upptøkur frá føroyskum trúboðarum, møtir frá ymiskum samkomum og kirkjum og upptøkur frá evangeliskum og mentanarligum tiltøkum í Føroyum, sum eru viðkomandi fyri hesa rásina. At byrja við er ætlanin at senda 1-2 tímar morgun, seinnapart og kvøld, 5 dagar um vikuna og síðan víðka um senditíðina, samstundis sum kirkjur, samkomur og onnur áhugað byrja at lata meira tilfar og luttaka í beinleiðis sendingum.

**Vit vóna at allar áhugaðar evangeliskar samkomur og kirkjur seta seg í samband við okkum, fyri at tosa um hvat tit kundu hugsa tykkum at sent á sjónvarpsrásini IKTUS. Vónandi finna tit íblástur í uppskotinum omanfyri.**

Viðvíkjandi útgerð, so leigar IKTUS upptøkuhølir **á Steinamørk í Søldarfirði, har vit kunnu taka upp. U**pptøkuhølini eru serliga væl egnað til samrøður og sangframførðslu og tað eina kann eisini nýtast til talur og rúmar uml 30 áhoyrarum; men vit vóna tó, sum frá líður, at fleiri samkomur og kirkjur royna at brúka egna útgerð til upptøkur frá sínum hølum. Vit vilja fegin vegleiða í tekniskum spurningum, so tit fáa so góða og bíliga útgerð sum gjørligt. Vit kunnu eisini geva upptøkuvegleiðing (sí niðanfyri).

Um tit ynskja at fáa meir at vita, kunnu tit seta tykkum í samband við okkum ella vitja okkara heimasíðu: www.iktus.fo

Vinarligast,
Anja Hansen

**IKTUS, kristiligt sjónvarp**
c/o Anja Hansen
Landsvegur 9
FO-511 Gøtugjógv
tlf 507710
t-post: iktus@iktus.fo
heimasíða: www.iktus.fo

**Leiðslan í IKTUS, kristiligt sjónvarp:**

*Nevnd:*
Anja Hansen, ábyrgdari, t-post: anja@iktus.fo
Randi Jacobsen, t-post: randi@iktus.fo
Ingi P. Jacobsen, t-post: ingi@iktus.fo

*Starvsnevnd:*
Anja Hansen, programleiðari,
t-post: anja@iktus.fo

tel: 507710
Ingi P. Jacobsen, tøkniligur vegleiðari,
t-post: ingi@iktus.fo

## Vegleiðing til upptøku av talum og fyrilestrum:

**Eitt upptøkutól:**
Tá bert eitt upttøkutól verður nýtt at taka upp eina talu, er best at tað stendur á einum stativi framman fyri talaran (ikki frá síðuni), og um talan er t.d. 30 min, so kann varliga skiftast millum nærmynd og standardmynd av og á.
Áðrenn ella aftaná taluna kann eisini vísast ein heildarmynd av hølunum og fólkunum, fyri at geva luft til upptøkuna.

**Fleiri upptøkutól:**
Tað mest vanliga er at hava:
- upptøkutól nr.1 á stativi mitt frammanfyri talaran, sum fylgir talaranum alla tíð um hann flytur seg, og fyri tað mesta vísir standardmynd,
- upptøkutól nr.2 á aðrari síðuni har afturi, sum vísir heildarmynd fyri tað mesta,
- og upptøkutól nr.3 frammanfyri áhoyrarunum, sum uml annan hvønn minutt vísir eina mynd heilt stutt (3-5 sek) av t.d. 2,4 ella 8 fólkum í senn og viðhvørt nærmynd av talarinum.
- Upptøkutól nr 2 og 3 kunnu taka upp uttan stativ, tí tey vísa so stutt í senn.

*Nærmynd: Frá bróstlumma og sindur upp um høvd.*
*Standardmynd: Frá niðara jakkalumma og sindur upp um høvd.*
*Heildarmynd: Vísir har afturi frá og fram móti talarinum, ikki vísa ov nógv av loftinum.*